HEILSANIR



Góðasti Regin
Mamma og babba ynskja tær hjartaliga tillukku við 14 ára degnum og alt gott í framtíðini.
Mamma og babba

Góða elskaða Laurina!
Hjartaliga tillukku á tínum 2 ára degi. Vit elska teg.
Ynskja mamma, pabba og Bjarta

Góði elskaði pabba
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum ið var 6.9. Takk fyri at tú ert so góður við okkum.
Bestu ynski frá tínum 5 døtrum
P. S. Betur seint enn ongantíð

Góða elskaða Jórunn
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum.
Ynskja Bjarni og Signa, mamma og babba

Ja, her standa tveir góðir málmenn – góði Regin
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum.
Heilsan gumman

Góða Elin
Tað munnu vera fá, sum standa á hondunum á Slættaratindi. Hetta var ein frálíkur túrur. Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum í dag. Jesus signi framtíð tína.
Ynskja mamma, babba, John Heri og Otto



Góði Allan
Hjartaliga tillukku við próvnum. Eg ynski tær alt gott.
Bestu heilsanir Amy

Góða Anna-omman
Tillukku við 63 ára degnum. Takk fyri at tú altíð tekur so væl ímóti okkum.
Ynskja ommubørnini

Góði babba
Ein seinkað heilsan til tín á føðingardegnum. Her sært tú hvussu raskur tú ert.
Bestu heilsanir dóttir tín



Góðasti Rúni
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Vit gleða okkum til oktober.
Kærar heilsanir frá okkum øllum í Strib og Ribe – Esbjerg

Góði Allan
Hjartaliga tillukku við próvnum, alt tað besta í framtíðini.
Ynskja mamma og babba

Góða Eivør Súsanna
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 21. sept. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska teg.
Ynskja mamma og babba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..
....
....
....
....
....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla, einki møti sunnukvøldið vegna møti í Læraraskúlanum. Øll eru vælkomin.

»Tíð til Gud«
Úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21. Vit fara nú sunnukvøldið at hyggja at Amerikansku støðuni sum hon sær út frá Dániel profeti. Evnið eitur: Hell-Shaking Prayer. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Endi tíðarinnar. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli og kl. 18 møti. Óli Steinberg, trúboðari í Grønlandi talar.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 húsmøti hjá Ann Mari og Fríðtór, Bringstún 4, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Paul Marx O.M.I. í Mariukirkjuni.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Fundur við Sólbjørg Mortensen (bert fyri limir).

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 10 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Niels Jákup Nielsen, Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

Filadelfia
Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 møti í læraraskúlahøllini v/ Moses Hansen, í morgin kl. 17 landsbøn, kl. 20 møti í læraraskúlahøllini v/ Moses Hansen.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti í Filadelfia v/ Moses Hansen, kl. 11.30-12.45 barnagudstænasta, kl. 18 møti í Lææraskúlahøllini v/ Moses Hansen, kl. 22 útimøti v/ Filadelfia.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongins Herlið 8 ár og eldri eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Telefonandaktin: 424741.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Regin Høgnesen, trúboðara.

Filadelfia, Sundalagi
Sunnudagin kl. 18 Alphaskeið v/ Sam Jacobsen.
Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin.

Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17 við Martin & Oydis Olsen, Rituvík.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19.00 hjá Gerdu Petersen, Norðragøtu.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús v/ Maybritt og Kaj.
Sunnudagin kl. 17 møti v/ Paula Høj, kl. 17 barnamøti.
Mánakvøldið kl. 19-20 bøn.
Tú ert vælkomin í Kelduna.

Missiónshúsið Tabor, Toftir
Sunnukvøldið kl. 19 møti. Til møti kemur Luthersk Missionsforenings Højskole (LMH) at taka lut við talu og sangi. Eisini kemur Taborkórið at syngja. Aftaná verður drekka.

Emmaus
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti í Christianskirkjuni har Luthersk Missionsforenings Højskole (LMH) luttekur við talu og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 6 bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 bøn v/ Team Xtream.
Leygarmorgunin kl. 9 bøn v/ Getsemane, kl. 20 ungdómsløta í Atlantis.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 lovsangur og møti kl. 18.

Missiónshúsið í Skálavík
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við talu og sangi. Missiónsvikan verður frá 8.-11. november.

Café One Way, Tvøroyri
Fríggjakvøldið kl. 21 tosar Ólavur Jacobsen um evnið: Er títt hús eitt heim?
Leygarkvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti við Ólavur Jacobsen.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum fríggjakvøldið kl. 21 v/ Thorleif Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Sunnukvøldið verður møti við Sigrid og Mouritz. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 heimaforbundið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Porkeri
Á møtinum sunnudagin kl. 18 talar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari. Øll eru vælkomin.

Suðuroy
Allir sjómanskvinnuringarnir í Suðuroy samlast í missiónshúsinum í Porkeri leygardagin 22. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Zion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Ólavur Jacobsen talar, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 17.9.
kl. 10-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15 Ítriv í kjallaranum. Seyma fýrkantar saman til teppir til Móðir Theresu felagsskapin. Kortspæl, telving og onnur spøl. **Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491 kostnaður.**
Týsdagin 18.9.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Kórsangur, Beinta Háberg Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Uppgávufólk – stuttsøga eftir Jeppe Aakjær. Hanna Lisberg hevur týtt og lesur. 2. partur.
Mikudagin 19.9.
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn mikudag kl. 10-13.30. Tilm. tlf. 421580/316491 – Anne G. Harlou.
kl. 15 Túrur
Hósdagin 20.9.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 21.9.
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 23. sept. verður gingið til Risastovu og Argjaskot. Farið verður frá Albert Hall. Havið heit og

www.sosialurin.fo

FARPACK

DANAK
DNV

Í sambandi við at bygningurin, sum sp/f Snaraløkur hevur latið bygt, verður tikin í nýtslu fríggjadagin 21. sept. verður hervið boðið til móttøku í húsinum frá kl. 14.00 - 18.00

Øll eru vælkomin.

FØROYA TELE
Rasmussen & Weihe
SP/F SNARALØKUR